# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 26. oktobur 2022, kl. 17.00

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, eru tvey nýggj mál innkomin. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málini verða sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málini verða sett á skrá sum mál nr. 149 og 150.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**.

**Mál 139**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um leiðreglur fyri mentanarstuðul.
J.nr.: 1002-3-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. oktobur 2022 mál um at fáa eitt amboð til viðgerð av stuðulsumsóknunum til Vestmanna Kommunu.

Endamálið við stuðulspolitikkinum er:

1. at lýsa hvønn stuðul kann verða latin til;
2. at greiða frá, hvør tekur avgerð um stuðul.

Fíggjarnevndin heitti á bygdarráðið, um at samtykkja uppskotið til leiðreglur fyri mentanarstuðul.

**Viðv. 139**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

**Mál 140**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umraðfesting av játtan til asfaltering ymsa staðni í bygdini til 2. viðgerð
J.nr.: 50002-1-2022

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi, tann 28. septembur 2022, 1. viðgerð av umraðfesting av játtan til asfaltering ymsa staðni í bygdini.

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt, at kr. 180.000 til "asfaltering" verða fluttar av játtanin til "maskinhøllina".

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 19. oktobur 2022 til 2. viðgerð og mælir bygdarráðnum til at samtykkja málið við 2. viðgerð.

**Viðv. 140**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 141**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umráðfesting av játtan til Byggibúning til 2. viðgerð.
J.nr.: 30102-1-2021

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi, tann 28. septembur 2022, 1. viðgerð av umraðfesting av játtan til byggibúning.

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt at kr. 250.000 verða umraðfestar av játtanini "maskinhøllin" til byggibúning.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 19. oktobur 2022 til 2. viðgerð og mælir bygdarráðnum til at samtykkja málið við 2. viðgerð.

**Viðv. 141**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 142**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umraðfesting av játtan til fimm pør av bungum til 2. viðgerð
J.nr.: 513003-1-2022

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi tann. 24. august 2022 hetta mál: Vestmanna Bygdarráð samtykti á fundi tann 29. juni 2022 tilmæli frá Teknisku Nevnd um at útvega 5 pør av bungum (10 bungur við útgerð) til 50 km/tíman.

Bygdarráðið samtykti einmælt at játta kr. 50.000 av játtanini hjá umsitingini fyribils og at finna upphæddina á endurskoðaðu fíggjarætlanini seinni í ár.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 19. oktobur 2022 til 2. viðgerð og mælir bygdarráðnum til at samtykkja málið við 2. viðgerð.

**Viðv. 142**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 143**
Endurskoðað Fíggjarætlan fyri 2022
J.nr. 30102-1-2021

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. oktobur 2022 mál um at leggja fram endurskoðaðu fíggjarætlanina fyri 2022 fyri Vestmanna Kommunu.

**Viðv. 143**
Endurskoðað Fíggjarætlan fyri 2022 varð løgd fram.

Bjørg á Rógvi fór av fundinum vegna ógegni, og varð ikki við í viðgerðini av mál nr. 144.

**Mál 144**
Umsókn um loyvi til at keypa lendi fram við neystalendunum 266g og 266e inni á Fitjum og til umskipan av lendunum.
J. nr. 8202002-4-2022

Havnanevndin viðgjørdi á fundi tann 19. oktobur 2022 umsókn um loyvi til at keypa lendi fram við neystalendunum 266g og 266e inni á Fitjum og til umskipan av lendunum.

Havnanevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 19. oktobur 2022.
Nevndin samtykti einmælt at leggja málið fyri Bygdarráðið til støðutakan, og heitti á umsitingina at kanna málið fyri at tryggja at málið ikki skapar fordømi.

**Viðv. 144**
Tilmælið frá Havnanevndini varð einmælt samtykt.

Bjørg á Rógvi kom aftur á fundin.

**Mál 145**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um eykajáttan til parkeringspláss til 1. viðgerð.
J.nr. 30102-1-2021

Niðanfyri eru kostnaðarmetingar fyri 2stk p-øki við Fjalsveg.

P-øki nr. 1 við Fjalsveg nærhendis matr. 337c

| | |
|---|---|
| Íalt | 133.500kr |

P-øki nr. 2 við Fjalsveg nærhendis matr. 298b

| | |
|---|---|
| Íalt | 238.500kr |

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. oktobur 2022 mál um eykajáttan á kr. 372.000 til tvey parkeringsøki við Fjalsveg.

Nevndin samtykti einmælt eykajáttan á kr. 372.000 við 1. viðgerð

**Viðv. 145**
Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt eykajáttan við 1. viðgerð

**Mál 146**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um eykajáttan til at leggja á í rør við Niðaraveg
J.nr. 30102-1-2021

Leggja á í Ø500 rør á matr. 258a

| | |
|---|---|
| Íalt | 197.375kr |

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 19. oktobur 2022 mál um eykakostnað á kr. 197.375 til at leggja á í rør við Niðaraveg.

Tað mangla kr. 100.000 til arbeiðið. Nevndin heitti á Bygdarráðið um at loyva eini eykajáttan á kr. 100.000 við 1. viðgerð.

**Viðv. 146**
Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt eykajáttan við 1. viðgerð.

**Mál 147**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd um umskipan av lendum undir maskinhøllini og brandstøðini.
J.nr.104002-3-2022

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 18. oktobur 2022 mál um umskipan av lendum undir maskinhøllini og brandstøðini og striking av matr. nr. 282aæ.

Nevndin mælir til at viðmæla umskipanini.

**Viðv. 147**
Tilmælið hjá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 148**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd um umskipan millum kommunalu ognirnar matr. nr. 298b og litra "cd".
J.nr.104002-4-2022

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 18. oktobur 2022 mál um umskipan millum kommunalu ognirnar matr. nr. 298b og litra "cd".

Nevndin mælir til at viðmæla umskipanini.

**Viðv. 148**
Tilmælið hjá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt

**Mál 149**
Val av nevndum og umboðum
J.nr.: 22042-1-2020

Dánjal Jákup Andreassen hevur tikið seg úr:
- valnevndini fyri Kommunuval
- valnevndini fyri Løgtings- og Fólkatingsval

Umsitingini mælir til at velja:
- Sámal Joensen í valnevndina fyri Kommunuval
- Rúna Joensen í valnevndina fyri Løgtings- og Fólkatingsval

**Viðv. 149**
Tilmælið hjá umsitingini varð einmælt samtykt

**Mál 150**
Umsókn til ummælis um umskipan uttangarðs – millum matr. nr. 59g og 317a.

Sambært Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við Løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, skal kommunan ummæla umsóknina.

**Viðv. 150**
Tað varð einmælt samtykt at viðmæla umsóknini.

Bókin lisin. Fundurin lokin 18:05

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen Pauli T. Petersen